## Pávin farin

Jóhannes Páll pávi annar doyr 84 ára gamal. Pavin hevur verið merktur av sjúku seinnu árini, og fyrst í apríl fór hann.

- Fyri katolikkar og nógv onnur við var Pávin tann størsti á jørð. Tú vart ongantíð í iva um, hvat hann stóð fyri, og eini slíkari fyrimynd hevur heimurin kanska meir brúk fyri nú, enn nakrantíð, sigur Kinn Magnussen úr Havn, sum er katolikkur, og sum er ein av 10 føroyingum, sum fingu høvi at hitta páva í Danmark í 1989.

Joseph Ratzinger, sum er ættaður úr Týsklandi, verður valdur til nýggjan páva. Hann fær navnið Benedikt 16.

## Astrup takkar fyri seg

Danski bankastjórin í Føroya Banka boðar frá, at hann fer úr starvinum 1. mai.

– Eg og konan hava altíð ætlað okkum at flyta aftur til Danmarkar, og eg haldi, at vit skulu gera tað, meðan vit framvegis kunnu tyggja gras, sigur Jørn Astrup Hansen.

Hann kom til Føroya í ringastu kreppuárunum at vera bankastjóri, og hóast steðgurin ikki skuldi verða langur, fer Astrup nústani av landinum aftur.

– Eg havi verið sera glaður fyri at verða í Føroyum, okkum hevur dámt sera væl her, og nú vit fara avstað aftur, liggur ein partur av okkum eftir í Føroyum, sigur hann.

## Uni í sjeynda blueshimli

Tríggjar góðar framførslur vóru til finaluna í Prix Føroyum, og dómararnir, sum hesaferð bara vóru útlendskir, valdu GoGo Blues til vinnara. Finalan hevði tað mesta – handverkararock, føroyskan blues og popp við broddi í.

Terji Rasmussen, Eyðun Nolsøe og GoGo Blues kappaðust um sigurin í kappingini, og tað yngsti av teimum vann.

– Tað var fantastiskt. Tað besta við at vinna Prix Føroyar var, at vit fingu eina viku í einum góðum studio. Tað var akkurát tað, sum vit høvdu brúk fyri, tí vit hava nógv tilfar liggjandi, sum vit vilja hava spælt inn, sigur Uni R Debess, oddamaður í bólkinum.

*[ Apríl ]*



*Sosialurin flytir inn í miðbýin í Havnini eftir næstan 25 ár í blaðhúsum á Argjum*

# Sosialurin flytir inn í Miðlahús í Vágsbotni

**Aftan á næstan 25 ár á Argjum flytir Sosialurin til Havnar við síni høvuðsskrivstovu. Nýggja og snotuliga Miðlahúsið í Vágsbotni verður nú høvuðsstøð hjá blaðnum**

Mánadagur 11. apríl varð ein søguligur dagur á Sosialinum. Tá høvdu starvsfólkini á blaðnum sín fyrsta starvsdag í nýggja Miðlahúsinum í Vágsbotni.

– Vit á blaðnum fegnast um hesa nýggju og spennandi avbjóðingina og kunnu eisini gleðast um, at vit hava verið so heppin at fáa atgongd til henda bygning og hetta søguliga og sentrala stað, sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum.

Starvsfólk og leiðsla á Sosialinum hava leingi glett seg til innflytingardagin, sum varð fluttur aftur nakrar ferðir. Ætlanin var at flyta inn áðrenn páskir, men mongum brestir ætlan. Fríggjadagurin tann 8. apríl gjørdist so endiliga dagurin, har fjølbroytta miðlafyritøkan flutti av Argjum og inn í gamla bygningin hjá Valdemar Lützen í Vágsbotni.

Fyri 23 árum síðani flutti Sosialurin annars úr Havnini og út á Argjar. Tá hevði blaðið húsast undir trongum umstøðum, fyrst á Heygsbreyt í Havn, har Einars Offsett er, og seinnapartin av sjeytiárunum í einum sethúsum í Sjúrðargøtu 9.

### Hoyra heima í miðbýnum

Ein ørgrynna av fólkið var inni á gólvinum, tá ið Sosialurin nakrar dagar seinni hevði almenna móttøku.

Millum teirra, sum helt røðu, var borgarstjórin í Havn.

– Vit, ið hava okkara dagligu gongd her í miðbýnum, fegnast um, at hava fingið ein so kreativan og virkisfýsnan granna, og eg ivist onga løtu í, at tit fara at skapa eitt stórt virksemi her í miðbýnum, segði Heðin Mortensen.

– Her er brotið upp úr nýggjum í føroyska fjølmiðlaheiminum, og eg ivist onga løtu í, at blaðleiðslan hevur tikið rætta avgerð. Sjálvandi skal ein redaktión og eitt blaðhús - ja, nú eitur



*Ein ørgrynna av fólki vitjaði inni á gólvinum í Miðlahúsinum í Vágsbotni, tá ið almenn móttøka var har*

» Føroyar eru reyvin á fjórðu deild og skulu vit upp í elituna, verða vit noydd at taka okkum heilt alvorliga saman. Tað er alt annað enn sjálvsagt, at Føroyar fara at menna seg. Í veruleikanum hevur tað ongantíð verið so lítið sjálvsagt, sum nú. «

*- Tróndur Djurhuus, menningarleiðari á Føroya Tele*

» Tað løgna er, at nógv halda, at júst teirra søga er lítið verd. Mær dámar serliga væl at tosa við fólk, og mínar royndir eru, øll hava okkurt áhugavert at siga frá. Um eg tosi við fólk í haganum ella geri eitt kaffiprát í einum køki, so er altíð okkurt at frætta. «

*- Jónheðin H. Tróndheim, útvarpsmaður*

**Í kappingini um Løgmanssteypið verða B36 og KÍ tveitt út, tí tey hava brúkt spælarar, sum ikki høvdu neyðugu spæliloyvini í lagi.**